# Løgtingið og tingnevndirnar: stovnslig eyðkenni og politiskt virksemi

fróðskapur
Faroe University Press
Fróðskaparrit 71 (2025): 93-115
©The Author(s) 2025 Open Access under Creative Commons by Attribution License. Use, distribution and reproduction are unrestricted. Authors and original publication must be credited.
www.frodskapur.fo/

## The Løgting and parliamentary committees: Institutional conditions and political activity

**Hallbera West**[1], Ph.d., Postdoctoral Fellow, University of Agder og/and affiliated researcher, University of Aarhus

**Abstract**

A typical distinction for parliaments in parliamentary systems is between a “working” or “debating” parliament. In a “working parliament” the parliamentary committees play a vital role. Nevertheless, there still might be differences in the ways committees work. Committees can function as tools for parliament to strengthen the position towards government, function as arenas for partisan competition, or as options for individual MPs to make agreements on allocations of distributional benefits. The expectation is that especially the institutional and partisan explanations apply. Based on information about institutional settings and a selection of activity data, the article investigates the committee system in the Løgting, including when institutional, partisan, and/or distributional characteristics apply. The investigation shows that the committee system in the Løgting adheres to characteristics for a “working parliament” and that a substantial part of the meetings take place in committees but unevenly divided between the committees. Although, the committees have institutional and partisan characteristics, the conditions for partisan behaviour seem stronger. Yet, the oversight committees have stronger institutional characteristics but conditioned by limited administrative support in general. For some committees, additional influence from the distributional model is worth considering.

**Úrtak**

Ting í skipan við tingræði kunnu virka sum mest “arbeiðandi” ella mest “kjakandi” ting. Í einum “arbeiðandi tingi” hava tingnevndirnar ein týðandi leiklut, men kunnu virka á ymiskan hátt. Tær kunnu virka sum amboð hjá

[1] T-postur: hallbera.f.west@uia.no. ORCID: https://orcid.org/0000-0003-0008-0234

tinginum at styrkja sær støðuna mótvegis stjórnarvaldinum, virka sum pallar fyri flokspolitiska kapping og/ella sum amboð hjá einstøkum tingfólkum til at gera avtalur um býtisfyrimunir. Væntanin er, at serliga stovnsfrágreiðingin og flokspolitiska frágreiðingin hava týdning. Við støði í stovnsligum eyðkennum og einum úrvali av politiskum virksemi verður tingnevndarskipanin í Løgtinginum kannað, íroknað í hvørjum føri stovnslig, flokspolitisk ella einstaklingabýtis-politisk eyðkenni eru galdandi fyri tingnevndirnar. Kanningin vísur, at tingnevndarskipanin er skipað sambært vanligum eyðkennum fyri "arbeiðandi ting", og at ein týðandi partur av virkseminum fer fram í tingnevndunum. Tingnevndirnar eru tó ikki javnt virknar, men hava sum heild stovnsligar og flokspolitiskar fortreytir at virka eftir, tó eru fortreytirnar fyri flokspolitikk sterkari. Serliga eftirlitsvirksemið hevur stovnslig eyðkenni, men umsitingarliga orkan er sum heild sera avmarkað. Fyri einstakar tingnevndir eru eisini ábendingar um einstaklinga býtispolitisk eyðkenni.

**Keywords:** The Faroese Parliament, parliamentary committees, political parties.
**Leitorð:** Løgtingið, tingnevndir, politiskir flokkar.

## Inngangur

Greinin setur sjóneykuna á Løgtingið sum sjálvstøðugan stovn í føroysku politisku skipanini, men við denti á tingnevndirnar. Tað verður ofta ført fram, at ting í skipan við tingræði einans eru "gummistempul" fyri virkseminum hjá eini stjórn, men henda grein tekur støði í, at tað er ov einfalt. Í skipan við tingræði er tað vanliga stjórnin, ið tekur stig til politiskar broytingar, men tingið skal taka undir við førda politikkinum, og ting hava amboð, alt eftir hvørji stovnslig eyðkenni eru galdandi, til at gera sína ávirkan galdandi. Hvønn týdning og leiklut eitt ting hevur í skipan við tingræði kann tó vera ymiskt frá skipan til skipan (t.d. Kreppel 2014, 2017).

Í høvuðsheitum verður skilt millum sonevnd "kjakandi" og "arbeiðandi" ting. Kenda orðingin hjá Woodrow Wilson lýsir munin sum: "Congress in session is Congress on public exhibition, whilst Congress in its committee-rooms is Congress at work" (Martin 2014: 25). Munurin er at finna í týdninginum og styrkini á tingnevndunum, sum ting vanliga skipa seg við. Tingnevndirnar kunnu nevniliga vera betri ella verri skipaðar og hava góð ella minni góð amboð til uppgávur sínar (t.d. Mattson & Strøm 1995; Sieberer 2011; Siefken & Rommetvedt 2021; West 2024a). Harumframt hevur umsitingarliga orkan í tinginum týdning og er vorðin ein granskingarspurningur í sjálvum sær (t.d. Fasone 2023). Henda greinin setur sjóneykuna á tingnevndirnar í Løgtinginum og kannar, hvønn týdning og leiklut tær hava.

Tingnevndirnar kunnu hava týdning á ymiskan hátt. Ástøðiligir myndlar eru ikki á einum máli um, hvussu tingnevndir virka og hvønn tingnevndirnar í veruleikanum eru amboð hjá. Sonevndi stovnsmyndilin vil vera við, at tingnevndir eru amboð hjá tinginum og styrkja støðuna hjá tinginum mótvegis

stjórnarvaldinum. Flokspolitiski myndilin vil hinvegin vera við, at tingnevndirnar virka sum pallar fyri partapolitiskt kappingarvirksemi, og sonevndi býtismyndilin vísir á tingnevndarsessir sum amboð hjá einstøkum tingfólkum til at gera avtalur sínámillum um at luta politiskum baklandi býtisfyrimunir. Í skipan við lutfalsvali og sterkum politiskum flokkum, eins og tí føroysku, er væntanin, at politiska atferðin í tingnevndum er eyðkend av stovnsligum og flokspolitiskum virksemi, men serliga virksemi eyðkent av samgongu mótvegis andstøðu (Hansen 2019; Heidar 2000). Men føroyska valskipanin hevur opnar listar, tvs. at veljarin avger einsamallur, hvørji flokspolitisk umboð verða vald. Býtismyndilin kann tí hava ein ávísan týdning, tó treytað av stovnsligum eyðkennum fyri tingnevndirnar.

Í greinini verður við støði í stovnsligum eyðkennum og einum úrvali av politiskum virksemi kannað, um Løgtingið er dømi um eitt "arbeiðandi" ting við týdningarmiklum tingnevndum, og kannað verður, um tingnevndirnar hava stovnslig, flokspolitisk og einstaklinga býtispolitisk eyðkenni. Kanningin vísur, at tingnevndirnar í Løgtinginum eru virknar, men ikki javnt virknar, og at tingnevndirnar eru skipaðar sambært meginreglu um sergreining og hava munagóð amboð, ið eru grundarlag fyri sonevndum"arbeiðandi" tingum. Vanligu tingnevndirnar virka bæði sum amboð hjá Løgtinginum mótvegis stjórn, men helst í størri mun sum pallar fyri flokspolitiskt virksemi. Umsitingarliga orkan hjá Løgtinginum er sera avmarkað, og tað avmarkar helst møguleikarnar hjá tingnevndunum at virka sum amboð hjá Løgtinginum mótvegis stjórnar- og fyrisitingarvaldinum. Eftirlitsnevndirnar hava tó fleiri stovnslig eyðkennir, serliga nevndin fyri løgtingsgrannskoðarar, ið fær umsitingarligan stuðul frá Landsgrannskoðanini. Fyri fíggjarnevndina og uttanlandsnevndina tykist tó einstaklinga býtismyndilin eisini at vera viðkomandi.

Greinin heldur fram við fyrst at greiða frá um týdningin av skipanarligum og stovnsligum eyðkennum og um politiskar flokkar. Síðani nágreinar greinin ástøðiligar myndlar fyri tingnevndir og tingnevndarvirksemi. Í seinna partinum verður fyrst greitt frá um kanningina og dátur og síðani verða úrslitini fyri eyðkenni og virksemi løgd fram. Til seinast verður niðurstøða gjørd.

## Stovnsligir karmar og politiskir flokkar

Í eini skipan við tingræði er tað tingið, ið letur stjórnini vald. Týdningarmesta eyðkenni í eini skipan við tingræði er, at ein stjórn einans hevur lív lagað, um tingið hevur álit á henni (Strøm 2003). Skipanir við tingræði hava tættari samband millum lóggávuvaldið og stjórnarvaldið, ið virka sum tvey samansjóðaði heldur enn tvey sundurbýtt vald. Tað kann tí tykjast sum, at virksemið einans er stýrt av flokspolitiskari kapping, serliga millum andstøðu og samgongu, men tað er kortini stovnsligt grundarlag fyri øðrum atferðareyðkennum eisini (hugtakið "modes" hjá Andeweg & Nijzink 1995).

Í skipanum við tingræði hava politiskir flokkar høvuðsleiklutin og eru týðandi fyri, at skipanin virkar eftir ætlan. Politisku flokkarnir loysa avbjóðingar við felags virkisføri (collective action challenges). Politiskir flokkar ávirka val av politiskum umboðum á ting, skipa stjórn, avgera hvørji umboð fáa sessir í stjórn, men ofta eisini býtið av nevndarsessum á tingi. Politiskir flokkar tryggja eisini, at tað er samsvar millum flokspolitisk sjónarmið í politiska baklandinum, í tinginum og í stjórnini (t.d. Andeweg & Nijzink 1995; Müller 2000; Saalfeld 2000; Strøm 2003, 2012).

Í skipanum við tingræði eru politiskir flokkar vanliga samanhangandi eindir, tvs. at flokspolitisku umboðini virka sum ein politiskur leikari. Tað verður vanliga mett út frá atkvøðuatferð, tvs. í hvønn mun limirnir í politisku flokkunum atkvøða eins í politiskum málum á tingi, og eru politiskir flokkar í Norðurlondum vanliga eyðkendir av einum høgum stigi av flokslýdni (Jensen 2000). Tílíkar atkvøðuuppgerðir eru ikki gjørdar fyri føroysku flokkarnar, og ofta verður ført fram, at flokslýdnið í Føroyum er vánaligt, men tað er umráðandi at skilja millum útsagnir og formligt politiskt virksemi sum t.d. atkvøðugreiðslur. Fleiri dømir eru um, at politisk umboð úttala seg kritiskt um politiska leið hjá egnum flokki og/ella stjórn, sum tey eru partur av, uttan at tað sæst aftur í *formligum* virksemi (West, 2018: 192, 229, 233, 250). Eisini eru fá dømir um sonevndar "ovurstórar" stjórnir, og stjórnir sita ofta eitt heilt valskeið (West 2022).

Greinin tekur støði í ástøðiligari fatan um, at skipanarligir og stovnsligir karmar hava týdning fyri, hvussu politiskir leikarar fara fram í tingvirksemi. Stovnsligir karmar avgera møguleikar og avmarkingar fyri virksemi, tvs. tilskila hvat virksemi ber til, og hvat virksemi ikki ber til. Karmar kunnu eisini tilskunda til ávíst virksemi fram um annað og til ávísa atferð fram um aðra (t.d. Hall and Taylor 1996; Scharpf 1997). Greinin tekur eisini støði í politiskum flokkum sum høvuðsleikarar, og at politisk kapping fyri tað mesta er millum flokkar (millum-flokka fatan), men samstundis kunnu skipanarligir og stovnsligir karmar gera, at tað eru møguleikar hjá politiskum einstaklingum at fáa ávirkan, og at áhugamál hjá politiskum umboðum eru ymisk innanhýsis í einum politiskum flokki (innanflokka fatan). Harafturat hevur tað týdning fyri politiskt virksemi, at politiskir leikarar fremst av øllum stremba eftir atkvøðum, politiskum málum (policy) og politiskum sessum av týdningi. Tað kann tó vera avbjóðandi hjá politisku leikarunum at viga hesi málini mótvegis hvørjum øðrum, men stovnsligu karmarnir hava eisini týdning fyri tann spurningin (Strøm 1990).

## Ting og tingnevndir

Um eitt ting skal hava ávirkan í eini politiskari skipan, serliga mótvegis stjórn og umsiting, so má tingið skipa seg. Í dagsins samfelagi eru politisk mál ofta torskild, og politisk umboð hava nógvar ymiskar uppgávur at taka sær av. Stjórnarstovnar hava samstundis styrkt sína støðu við størri umsitingum til at handfara dagsins samfelag. Fyri at økja um orku og førleika er vanligt, at tingið

skipar seg við tingnevndum, og at arbeiðsbýtið millum nevndirnar er skipað við sergreining sum leiðreglu (t.d. Martin & Vanberg 2014; Mattson & Strøm 1995; Müller & Sieberer 2014) .

Norðurlendsku tingini eru eyðkend av stovnsliga sterkum tingnevndum og verða vanliga mett sum dømi um "arbeiðandi" ting og ikki sum Westminister tingið í Onglandi, ið er tiltikna dømið um eitt "kjakandi ting" (Arter 2016; Esaiasson & Heidar 2000). Tiltøk eru tó gjørd síðani í Westminister fyri at styrkja tingnevndirnar og serliga skipanina við kanningarnevndum, "select committees" (Norton 2019). Í "arbeiðandi tingum" eru tað stjórnarumboð (landsstýrisfólk) og talsfólkini hjá politiska flokkinum í tinginum í viðkomandi máli, ið fyri tað mesta standa fyri viðgerðini av lógaruppskotum í tingsalinum, og tað er ikki stórvegis áhugi fyri at kjakast um málið. Tað, sum hevur mest týdning fyri tingviðgerðina, er viðgerðin í viðkomandi tingnevnd (Matthews 1960; Arter 2016).

Tingnevndir í "arbeiðandi tingum" eru vanliga skipaðar sambært meginregluni um sergreining, tvs. eftir politikkøkinum. Harumframt mugu tingnevndirnar hava neyðugar heimildir og amboð til at viðgera tingmál. Tað hevur týdning, at tingnevndirnar hava vanlig upplýsingarrættindi, heimildir til at biðja um tilfar, tá ið tær viðgera lógaruppskot, møguleika fyri at biðja landsstýrisfólk geva nærri frágreiðing, og um tær sjálvar kunnu taka stig til lógaruppskot ella gera uppskot til broytingar í lógaruppskotum (t.d. Mattson & Strøm, 1995). Ùt frá hesum atlitum verður mett um, hvørt tingnevndir eru sterkar, tá talan er um møguleikar fyri at ávirka mál í lóggávutilgongdini og møguleikar fyri at fáa kunning frá stjórn. Eitt annað atlit er, hvørjar møguleikar tingnevndin hevur fyri sjálv at seta mál á dagsskránna hjá nevndini. Tingnevndarskipanir kunnu tó verða sniðgivnar soleiðis, at tað er munur á styrkini hjá tingnevndini alt eftir, hvørja uppgávu talan er um. Kanning staðfestir t.d., at tingsnevndirnar í svenska Ríkisdegnum eru sterkari sambært samanberingini, tá ið talan er um lóggávutilgongdina, meðan tingnevndirnar í Fólkatinginum sambært samanberingini hava sterkari amboð til sjálvar at seta mál á dagsskrá (Sieberer 2011).

## Tingnevndir og ástøðiligir myndlar

Tingnevndir kunnu eisini virka sum amboð á ymiskan hátt. Í høvuðsheitum verður skilt millum sonevnda stovnsmyndilin, flokspolitiska myndilin og býtismyndilin (Martin 2014). Stovnsmyndilin vil vera við, at tingfólk brúka tingnevndararbeiðið til at kunna seg um mál, fáa vitan um viðkomandi málsøki, og at tingnevndirnar hervið økja um ávirkanina hjá tinginum og styrkja støðuna hjá tinginum sum stovn mótvegis stjórn og fyrisiting (Krehbiel 1991). Tingnevndir skipaðar eftirsergreining stuðla vanliga undir fatanini í stovnsmyndlinum. Onnur stovnslig eyðkenni eru áðurnevndu atlit við skipaðum arbeiðsbýti í politisku flokkunum, og at flokkar leggja dent á royndir og førleikar hjá politiskum umboðum, tá ið nevndarsessir verða býttir millum tingfólk.

Tingnevndarvirksemi sambært hesum myndlinum tekur støði í leiklutinum hjá tingfólki sum tingfólk. Við øðrum orðum, so vil eyðkenni fyri stovnsligt tingvirksemi verða tingið mótvegis stjórnini í støðutakan til tingnevndarmál.

Flokspolitiski myndilin vil harafturímóti vera við, at tingnevndir og tingnevndarsessir eru amboð hjá politiskum flokkum at røkka politiskum málum. Fram um alt annað umboða tingfólk politiskar flokkar í tingnevndararbeiði, tvs. at tingfólk luttaka í nevndarvirksemi fyri at umboða sjónarmiðini hjá politiska flokkinum. Ein tingnevnd er sostatt ikki ein sjálvstøðug stovnslig eind, men ein vígvøllur fyri partapolitiskt kappingarvirksemi (Cox & McCubbins 1993; Jensen 1995). Skipanarlig og stovnslig eyðkennir fyri greiðan flokspolitiskan leiklut eru, at politiskir flokkar fáa nevndarumboðan eftir stødd (lutfalli), og at politiskir flokkar avgera, hvørjar nevndarsessir tingfólkini/umboðini hjá flokkinum fáa. Tingnevndarvirksemi sambært hesum myndlinum tekur støði í, at tingfólk fyrst og fremst eru umboð fyri ein politiskan flokk og partur av antin eini samgongu ella eini andstøðu. Við øðrum orðum, so vil høvuðseyðkenni fyri flokspolitiskt virksemi verða politiskir flokkar í andstøðuni mótvegis politisku flokkunum í samgonguni í støðutakan til tingnevndarmál.

Ein triði myndil er sonevndi býtismyndilin, ið vil vera við, at tingfólk brúka tingnevndarsessir til at gera avtalur sínámillum um at tilluta ávísar býtisfyrimunir til politiskar stuðlar (Shepsle & Weingast 1994). Ein skipanarlig fortreyt fyri hesum myndli er, at valskipanin lønar politiskari einstaklingaatferð, tvs. at persónligar atkvøður geva størri møguleika fyri afturvali (cultivate a personal vote). Men fyri at persónlig politikaraatferð skal gerast partur av tingnevndararbeiði, so er fortreytin eisini, at stovnsligu karmarnir fyri tingnevndir gera tað møguligt at tilluta býtisfyrimunir sum part av tingnevndararbeiðinum. Politisk umboð kunnu nevniliga eisini brúka aðrar hættir at tryggja sær afturval, sum ikki hava nakað við tingnevndararbeiði at gera, t.d. sonevnda valdømistænastu (Martin 2011). Tingnevndarvirksemi sambært hesum myndlinum tekur støði í, at tingfólk fyrst og fremst eru umboð fyri eitt ávíst landafrøðiligt øki (t.d. eitt valdømi) ella fyri ávísar veljarabólkar. Við øðrum orðum, so vil høvuðseyðkenni fyri einstakliga býtisvirksemi verða tingnevndarásettir býtisfyrimunir til ávíst politiskt bakland hjá tingnevndarlimum, men sum ikki hevur samband við leiklutin sum umboð fyri politiskar flokkar.

Samanumtikið so eru tingnevndirnar sambært stovnsmyndlinum amboð hjá tinginum at styrkja støðuna sum stovn mótvegis stjórn og umsiting, sambært flokspolitiska myndlinum amboð hjá politisku flokkunum at røkka politiskum málum, og sambært býtismyndlinum amboð hjá politiskum einstaklingum at lata stuðlum býtisfyrimunir, við tí fyri eyga at tryggja afturval.

## Kanningin

Í greinini verður kannað, hvønn leiklut tingnevndirnar í Løgtinginum hava og um tingnevndirnar rúma møguleikum fyri ymiskum atferðarmynstrum. Fyri at svara kanningarspurninginum brúkar kanningin stovnslig eyðkennir av týdningi fyri tingnevndirnar í Løgtinginum og eitt úrval av tingnevndarvirksemi sum dátur.

Fyri at meta um leiklutin hjá tingnevndunum og um Løgtingið kann metast sum dømi um eitt "arbeiðandi ting" verður kannað, um tingnevndirnar eru skipaðar sambært meginregluni um sergreining, um tingnevndirnar hava munagóð amboð og heimildir til at viðgera mál, og hvussu nógv virksemi er í tingnevndunum samanborið við í tingsalinum. Virksemið verður mált sum tal av fundum, tingnevndarfundum og tingfundum. Tølini fyri tingnevndarfundir verða eisini býtt á tingnevndirnar, soleiðis at metast kann um munur er á tingnevndunum. Tølini fyri fundarvirksemi verða samanborin og brúkt til at meta um, hvussu stórur partur av tingvirkseminum fer fram í tingnevndunum samanborið við í tingsalinum. Tølini fevna um eitt 20 ára tíðarskeið, so til ber at kanna, um broytingar eru sæð yvir tíð.

Fyri at kanna um tingnevndirnar rúma ymiskum atferðarmynstrum er útgangsstøðið, at tað vanliga fyri eina skipan sum ta føroysku er, at einans stovnsmyndilin og flokspolitiski myndilin hava týdning. Tað er orsakað av valskipanini (lutfalsval), leiklutinum hjá politisku flokkunum og stovnslig eyðkennir fyri tingnevndirnar, at býtismyndilin vanliga ikki verður mettur sum týdningarmikil (Heidar, 2000: 207). Men føroyska valskipanin hevur opnar listar (í einum valdømi), tvs. at tað er veljarin einsamallur, ið avger, hvørji av flokspolitisku umboðunum verða vald. Føroyska valskipanin tilskundar eggjar tí í ein ávísan mun til einstaklingaatferð, tí tað eru persónligu atkvøðutølini og ikki ein flokspolitisk raðfesting, ið avger, hvørji av umboðunum hjá politisku flokkunum verða vald á ting. Tað er t.d. øvuta skipanin um ein samanber við Norra, ið tó heldur ikki er vanlig (Heidar & Karlsen 2018). Valskipanir býta ofta valdið at avgera, hvørji umboð verða vald, millum politisku flokkarnar og veljararnar. Men føroysku politisku flokkarnir avgera framvegis, hvørji umboð koma á listan hjá flokkinum til val, og eisini hvørjar sessir politisku umboðini fáa á tingi og í stjórn (sí nærri viðgerð í West 2018). Men onnur atlit, serliga landafrøðilig atlit hava týdning, t.d. í innanhýsis floksósemjum, hóast klassiska ósemjuásin millum miðstaðin og útjaðarin ikki er grundarlag undir stovnanini av politisku flokkunum, ið hava sess í Løgtinginum í dag (West 2022). Talan kann tó eisini verða um onnur atlit enn landafrøðilig, tvs. aðrar áhugapartar, tá talan er um at áseta býtisfyrimunir sum part av tingnevndararbeiði.

Fyri at meta um týdningin av myndlunum fyri tingnevndarvirksemi verða stovnslig eyðkennir tikin fram, ið eru felags fyri tingnevndirnar, men dentur verður eisini lagdur á stovnslig eyðkenni, ið eru serlig fyri ávísar tingnevndir og hervið geva rúm fyri ymiskari atferð treytað av, hvør tingnevnd talan er um. Í kanningini verða hesi atlit viðgjørd:

***Fyri stovnsmyndilin og flokspolitiska myndilin:***

- fyri stovnsmyndilin verður dentur lagdur á skipanina av tingnevndunum, tvs. áður nevnda meginregla um sergreining og amboð til at viðgera mál. Harumframt verður dentur lagdur á møguleikan hjá tingnevndum sjálvar at seta mál á dagsskrá og fáa kunning. Hesi atlit eru tey somu sum fyri eitt "arbeiðandi ting". Harumframt verður umsitingarliga orkan í Løgtinginum tikin við sum ábending, tvs. høgt stig av umsitingarligari orku stuðlar undir stovnsmyndilin, meðan lágt stig gevur størri vald til politiskar leikarar.
- fyri flokspolitiska myndilin verður dentur lagdur á val av tingnevndarlimum, tvs. um tað fer fram eftir flokspolitiskari støðd, um politisku flokkarnir avgera val av tingnevndarlimum, um stjórn/samgonga hevur ræði á tingnevndarvirksemi og viðgerðaramboðum.
- tingnevndarfyrispurningar er eitt amboð, sum nevndirnar hava til at ávirka, og verður brúkt sum atlit í meting um, hvørt tingnevndir virka sum amboð hjá tinginum ella sum pallar fyri flokspolitiskt virksemi, har samgongan ræður.
- eftirlitsamboð verða vanliga skipaði eftir stovnsleistinum, tvs. sum amboð hjá tinginum mótvegis stjórn (Andeweg & Nijzink 1995). Landsstýrismálanevndin og løgtingsgrannskoðarar eru eftirlitsnevndirnar í Løgtinginum, og mett verður í hvønn mun hesar virka eftir stovnsmyndlinum ella flokspolitiska myndlinum. Fyri løgtingsgrannskoðarar verða áður rokkin úrslit tikin fram (West 2018), men fyri landsstýrismálanevndina verða eftirlitsmál tikin fram og kannaði.
- semja millum andstøðu- og samgonguumboð verður mett sum stovnslig atferð, meðan ósemja millum andstøðu- og samgonguumboð verður mett sum partapolitisk atferð.

***Fyri býtismyndilin:***

- í hvønn mun tingnevndarskipanin ger tað møguligt hjá tingnevndarlimum at gera avtalur sínámillum um at áseta býtisfyrimunir, og um ábendingar eru um, at tingfólk gera tílíkar avtalur. Fíggjarnevndin er einasta nevnd, har tað beinleiðis ber til at áseta býtispolitiskar fyrimunir, men kannað verður, um uttanlandsnevndin eisini kann metast sum nevnd við tílíkum einstakliga býtispolitiskum eyðkennum.

## Úrslit

### *Løgtingið og tingnevndirnar*

Fyri spurningin um týdningin av tingnevndunum verður dentur lagdur á meginregluna um sergreining, styrkistøðuna og amboðini hjá tingnevndunum umframt stigið av virkseminum hjá tingnevndunum mált í tal av fundum.

### *Tingnevndirnar: sergreining, skipan og amboð*

Tingnevndarskipanin í Løgtinginum er skipað við 7 føstum tingnevndum, íroknað eina eftirlitsnevnd, landsstýrismálanevndina. Harumframt verða løgtingsgrannskoðarar valdir sambært serligari lóg. Tingnevndirnar hava 7 limir hvør, undantikið landsstýrismálanevndin, sum hevur 3 limir, og løgtingsgrannskoðararnir eru 4 í tali. Um samanborið verður við altjóða tøl, so er føroyska talið av nevndum og nevndarlimum í hvørjari nevnd sera lágt. Í einari altjóða kanning frá 2017 verða mørk fyri hóskandi tal av nevndum ásett til at vera millum 12 og 21 og hóskandi tøl fyri tal av nevndarlimum í hvørjari nevnd millum 13 og 28 (Garritzmann 2017). Hesi mørk eru tó sett við støði í tingum við nógv fleiri tingfólkum enn 33, ið er tingfólkatalið í Løgtinginum.

Sergreining kann eisini mátast sum tal av nevndarsessum fyri hvørt tingfólk. Um talið av nevndarsessum verður lagt saman og samanborið við tingsessir, so eru í alt 49 nevndarsessir til 33 tingfólk[2]. Talið av nevndarsessum er sostatt oman fyri 1 í miðal og er harvið hægri enn í norska Stórtinginum, ið er dømi um tingnevndarskipan við neyvari sergreining, tvs. ein nevndarsess fyri hvørt tingfólki, og hægri enn í svenska Ríkisdegnum, har talið er minni enn 1, men í danska Fólkatinginum er talið eisini hægri enn 1 (sí nærri viðgerð í West, 2018: 4.3.2; West 2024b).

Tingskipanin ásetur, hvussu mál skulu viðgerast. Tingmál verða býtt millum nevndir sambært meginregluni um sergreining, tvs. løgtingsmál verða býtt millum nevndir alt eftir, hvat málsøki talan er um. Málsøkini hjá tingnevndunum mynda fyri tað mesta málsøkini hjá aðalráðunum. Tingfólk taka sær sostatt av ávísum málum fram um onnur mál eftir, hvørji tingnevnd tey hava sæti í. Tingnevndir hava tó í fleiri førum málsøkir hjá meiri enn einum aðalráði, og dømir eru um, at fleiri tingnevndir hava málsøkir hjá sama aðalráði, men talan er ikki um somu málsøkir ella um dupultviðgerðir (Garritzmann 2017; West 2018).

Tingnevndirnar í Løgtinginum fáa tillutað mál til viðgerar frá løgtingsformanninum/kvinnuni (T: §24, 4). Men tingnevndirnar hava sjálvar formligt ræði á dagsskránni hjá nevndini (S: § 30,1) og avgera, hvussu nógv verður lagt fyri í nevndarviðgerðini av teimum ymisku málunum. Tingnevndirnar hava greiðar heimildir og møguleikar til neyva viðgerð av málunum og at orða uppskot til broytingar til tingmál, men tó ikki rætt til at umskriva lógir

[2] Tingfólk, ið gerast landsstýrisfólk, fara úr tingsessinum og varafólk kemur á ting í staðin (S: § 32), og tískil eru nevndarsessir viðkomandi fyri øll 33 (Arter 2016: 213 umrøður hetta stovnsliga eyðkenni). Sessir í altjóða sendinevndum eru ikki taldir við. Eitt ting kann tó velja at hugsa sendinevndarpláss saman við nevndarsessum, soleiðis at meginreglan um spesialisering verður gagnnýtt og talið harvið í veruleikanum ikki økist. Harumframt er vert at nevna, at tingfólkatalið á 33 er heldur lágt um støði verður tikið í kubikrótaregluni (West 2022: 91).

ella sum nevnd at leggja lógaruppskot fyri tingið. Tingnevndirnar kunnu bjóða ymiskum pørtum uttan fyri tingið á fund, og gera tað javnan, til at lýsa og gera viðmerkingar til mál. Tingnevndirnar kunnu eisini biðja um skjøl og biðja landsstýrisfólk um at møta á fundi hjá nevndini (Mattson & Strøm 1995; West 2018: 4.3).

### *Tingnevndirnar og stigið av virksemi*

Ein týðandi ábending um týdningin av tingnevndunum í Løgtinginum er, hvussu nógv virksemi fer fram í tingnevndunum. Tingnevndirnar avgera sjálvar, hvussu mál verða viðgjørd og hvussu umfatandi viðgerðin er. Stigið av fundarvirksemi er tí ein ábending um týdningin av tingnevndunum. Í mynd 1 eru tøl fyri tingfundir og fyri tingnevndarfundir frá 1997 til 2018, tvs. fyri áleið 20 tingár, og tað ber harvið til at samanbera stigið av tingnevndarvirksemi við stigið av tingvirksemi yvir tíð.

**Mynd 1**

Tal av árligum tingfundum, tingnevndarfundum og tingmálum, tingárini 1997-2018[3]




[3] Kelda: logting.fo. Tingfundir, nevndarfundir: Til 2008 hagtøl fyri Løgtingið. Eftir 2008: gerðabók, yvirlit yvir fundir fyri hvørja nevnd fyri hvørt løgtingsár. Tingmál: Til 2003: hagtøl fyri Løgtingið. Eftir 2003: tingmál, tinglisti, leita eftir málum til hvørja nevnd fyri hvørt løgtingsár, manuel uppteljing av listanum fyri mál. Hesar dátur eru eisini grundarlag undir mynd í aðrari útgávu.

Á myndini sæst greitt, at tingnevndirnar sum heild eru virknar. Talið av tingnevndarfundum skiftir tó nakað frá tingári til tingár, men liggur í tíðarskeiðinum 1997-2018 millum áleið 140 og 220. Talið av tingfundum liggur nakað undir 100 árliga. Talið av tingnevndarfundum er sostatt munandi hægri, enn talið av tingfundum. Tølini fyri tingnevndarfundir hava tó eina javna tendenslinju, tvs. at talið er støðugt sæð yvir tíðarskeiðið. Talan er sostatt ikki um nakran vøkstur í virkseminum, men talið fyri tingfundir er eisini støðugt sæð yvir alt tíðarskeiðið. Tað kann undra, um ein hyggur at tølunum fyri tingmál í sama tíðarskeiði í mynd 1, ið eru fleiri í tali sæð yvir tíð. Til samanberingar er miðaltalið av árligum tingnevndarfundum í norska Stortinget 375 og 383 fyri tíðarskeiðið 2009-2013 og 2013-2017, men tað talið fevnir um 12 tingnevndir (Rommetvedt 2021: talva 13.1).

Spurningurin er síðani, um stigið á tingnevndarvirksemi er javnt, tvs. um tær einstøku tingnevndirnar eru eins virknar. Um hugt verður at tingnevndarfundarvirkseminum aftur, men hesaferð fyri hvørja tingnevnd sær, so sæst munur á tingnevndunum. Mynd 2 vísur greitt, at virksemisstigið fyri ávísar nevndir er hægri enn fyri aðrar, tvs. at virksemið er ójavnt. Tingnevndarfundarvirksemi er hægst fyri fíggjarnevndina, men eisini vinnunevndin hevur fleiri fundir enn hinar tingnevndirnar. Landsstýrismálanevndin og mentanarnevndin hava minst fundarvirksemi.

Í miðal fyri tingárini 1997-2018 hevur fíggjarnevndin 43 fundir, vinnunevndin 34, uttanlandsnevndin 22, trivnaðarnevndin 20, rættarnevndin 19, mentannarnevndin 17 og landsstýrismálanevndin 13. Til samanberingar hevur hvør einstøk tingnevnd í norska Stortinget í miðal áleið 32 fundir um árið, við eini spjaðing frá á leið 23 til 39 tingnevndarfundir hvør, tvs. at munurin millum tingnevndirnar er minni. Tingnevndin fyri heilsumál liggur hægst og eftirlitsnevndin liggur eisini ovarliga, meðan fíggjarnevndin hevur lægri fundartal (Rommetvedt 2021: talva 13.1).

Samanumtikið so er tó greitt, at tingnevndirnar eru skipaðar sambært sergreining, at tingnevndirnar hava munagóð amboð at viðgera mál, og at lutfalsliga stórur partur av tingvirkseminum fer fram í tingnevndunum, tvs. at tað er grundarlag fyri at meta Løgtingið sum dømi um eitt "arbeiðandi ting". Men rættiliga stórur munur er á virksemisstiginum hjá tingnevndunum.

Viðgerðin setur nú sjóneykuna á, hvønn tingnevndirnar virka sum amboð hjá og á tingfólkaatferð. Spurningurin er, um tingnevndirnar eru amboð hjá Løgtinginum sum stovni, hjá politisku flokkunum og/ella hjá einstaka tingfólkinum.

**Mynd 2**

Tal av árligum tingnevndarfundum, býtt á tingnevndir, tingárini 1997-2018[4]




## Tingnevndir: stovnsligar ella flokspolitiskar fortreytir?

Løgtingið hevur formliga sæð ræðið á dagsskránni í tinginum, tvs. ikki stjórnin. Tingforfólkið setur nevniliga sjálvstøðugt dagsskránna (st.l.: § 13), og er tað fyrsta fortreyt fyri, at Løgtingið kann virka sum ein óheftur stovnur í politisku skipanini. Tingnevndirnar hava eisini sjálvar formliga ræði á dagsskránni hjá nevndini (tingsk.: § 30,1). Vanliga mannagongdin er tó samstundis tann, at tað verður avgjørt politiskt sum partur av samgongusamráðing, hvør politiskur flokkar fær tingformannin og hvørjir politiskir flokkar fáa forfólk í ymisku tingnevndunum, og tí skal formligi sjálvstøðugi leikluturin ikki yvirmetast. Harumframt so verða tingnevndarsessirnir tillutaðir eftir flokslutfalli (st.l. § 20, tingsk. § 23), og tingnevndirnar avmynda harvið flokspolitisku samansetingina í tinginum, ið er eyðkenni, sum stuðlar flokspolitiska myndlinum.

[4] Kelda: sí nota 2.

Tingnevndirnar hava eins og áður nevnt amboð at viðgera mál (sí partin oman fyri). Tingnevndirnar hava eisini stovnsliga heimild til sjálvar at seta mál á dagsskrá innan fyri málsøkið hjá nevndini við sonevndum samráðum (tingsk.: § 24,5). Men brúk av samráðum er treytað av undirtøku frá einum meiriluta av tingnevndini. Tingnevndirnar hava ikki vanlig kunningarrættindi og amboðið at hava sonevndar hoyringar er ikki tøkt. Tað eru rættiliga vanlig amboð hjá tingnevndum í Norðurlondum (West 2018: 4.3; West 2024a).

Tá talan er um viðgerð av tingnevndarmálum, tilskilar tingskipanin, at minnilutar kunnu fáa egnar viðmerkingar til mál við í álitið, ið verður skrivað til hvørt tingnevndarmál, og tað ber sostatt til hjá minnilutum at gera flokspolitiskar viðmerkingar (tingsk.: §32, §34,3). Tað vil siga, at tingnevndirnar í Løgtinginum kunnu - og tað gera tær eisini javnan - býta seg í ein meiriluta og ein minniluta í álitinum til tingmál, alt eftir um tingnevndarlimur er partur av politiskum flokki í samgongu ella andstøðu. Men henda regla kann eisini skiljast sum ein minnilutaverja, tí fyri tingnevndarvirksemi sum heild er vanlig meirilutaregla galdandi. Orðing í § 34 í tingskipanini kann eisini tulkast sum eitt eyðkenni, ið tryggjar, at tingið kann virka óheft av stjórnini. Í ásetingini stendur, at nevndarforfólkið skal taka atlit til sjónarmiðini hjá nevndarlimum og tryggja, at allar upplýsingar eru fingnar til vega, áðrenn álit verður skrivað. Harafturat eru tingnevndarfundir ikki almennir, og tað kann viðføra, at stjórnarflokkar í størri mun deila vitan við andstøðuflokkaumboð í tingnevndini, ið samstundis styrkir tingviðgerðina av málinum (Garritzman 2017; West 2018).

Samanumtikið so stuðla stovnsligu eyðkennini fyri tingnevndirnar bæði stovnsmyndlinum og flokspolitiska myndlinum, tvs. at stovnsligu eyðkennini tryggja møguleikan fyri, at tingfólk bæði kunnu leggja dent á leiklutin sum tingfólk og sum umboð fyri politiskar flokkar í tingnevndarbeiði. Men tað kann sjálvsagt verða trupult hjá tingfólki at viga hesi atlit hvørt móti øðrum, men ástøðiliga er greitt, um atlit verða tikin til leiklutin hjá politiskum flokkum, at leikluturin sum umboð fyri politiskar flokkar stendur sterkari enn leikluturin sum tingfólk (sí nærri viðgerð í West 2018: serliga partur 3.3).

### *Virksemisábending*

Um hugt verður nærri at skipanini við samráðum, ið eru mál sum tingnevndirnar sjálvar taka stig til, so kann brúk av tí amboðnum verða ein ábending um vigan millum stovnsatlit og flokspolitisk atlit. Skipanin við samráðum kom í 2008. Um mál koma fram alment ella um tingfólk ynskja vitan um ávís viðurskifti á málsøkinum hjá tingnevndini, so kann viðkomandi tingnevnd taka málið upp við avvarðandi landsstýrisfólk. Tingnevndin kann seta landsstýrisfólki fyrispurningar og biðja landsstýrisfólk um at svara skrivliga ella møta á fundi og geva frágreiðing. Men fyri at brúka skipanina krevst stuðul frá einum meiriluta av nevndini, enntá 5 av 7 nevndarlimum (tingsk.: §24,5). Í føroysku skipanini hevur stjórnin vanliga meirilutan av tingfólkunum við sær (yvirlit í West 2022), og tað er tí greitt, at um tingnevndir brúka amboðið, so

krevur tað stuðul frá samgonguumboðunum í tingnevndini. Tað er tískil ein greið ábending um stovnslig atlit, um tingnevndin stendur saman um at seta mál á skrá og fáa til vega vitan um mál. Stigið á virkseminum fyri hesa skipan kann tí geva eina ábending um týdningin av stovnsmyndlinum mótvegis flokspolitiska myndlinum. Í talvu 1 eru tøl fyri, hvussu ofta skipanin er brúkt, síðani hon varð sett í gildi.

**Talva 1**

Tal av nevndarfyrispurningum/samráðum, býtt á tingnevndir, tingárini 2008-2021[5]

| **Tingnevndir** | **Nevndarfyrispurningar** |
|---|---|
| Fíggjarnevndin | 5 |
| Mentanarnevndin | 3 |
| Rættarnevndin | 1 |
| Trivnaðarnevndin | 3 |
| Uttanlandsnevndin | 14 |
| Vinnunevndin | 5 |
| **Í alt** | **31** |

Í tíðarskeiðinum frá 2008-2021 eru einans 31 mál av hesum slag samanlangt fyri allar nevndirnar. Virksemið við nevndarfyrispurningum er sostatt sera lágt, og tað ber boð um flokspolitiska stýring av hesum amboði. Politiska ynskið má tí sigast at vera, at ein stjórn skal hava tamarhald á, hvussu og nær hetta amboðið verður brúkt. Í talvu 1 eru eisini tøl fyri býtið av samráðum millum tingnevndir, tvs. at talvan vísur, hvørjar nevndir hava sett nevndarfyrispurningarnar og hvussu nógvar. Tað er serliga uttanlandsnevndin, ið brúkar henda møguleika, og hevur sett nærum helvtina av øllum samráðunum, ið hava verið. Hinar nevndirnar hava í sera lítlan mun brúkt henda møguleika. Tað kann undra, at føroysku tingnevndirnar ikki gera sær dælt av hesum møguleika fyri sjálvar at taka mál upp. Men eins og nevnt, so krevur amboðið undirtøku frá einum meiriluta av limunum í tingnevndini og tað sær sostatt ikki út til at vera nógv rúm fyri stovnsliga leiklutinum í tingnevndunum sum heild. Eftirlitsnevndir eru tó vanliga skipaðar við øðrvísi eyðkennum og í næsta parti verða tær nærri viðgjørdar.

[5] Kelda: Yvirlit á www.logting.fo, her býtt upp eftir tingári og fyri hvørja nevnd sær.

## Eftirlitsnevndir og stovnslig eyðkenni

Løgtingið hevur tvær eftirlitsnevndir, nevndina fyri løgtingsgrannskoðarar og landsstýrismálanevndina. Hesar nevndir hava til felags, at endamálið er at styrkja tingið mótvegis stjórn og fyrisiting soleiðis, at galdandi karmar, reglur og siðvenjur verða virdar. Men tað er kortini ikki vist, at tílíkar nevndir virka sambært tí endamáli, tvs. at atferðin hjá tingfólki í eftirlitsnevndum kann kortini verða stýrd av flokspolitikki ella verða merkt av, at politisku flokkarnir raðfesta eftirlitsvirksemi niðarliga.

Gransking vísur greið flokspolitisk eyðkenni í eftirlitsvirksemi í Løgtinginum sum heild í og við, at tað fyri tað mesta er andstøðuvirksemi. Men tá talan er um neyvari stovnsligari skipan av eftirlitsvirksemi er eisini rúm fyri stovnsligari atferð, tvs. at eisini samgonguumboð luttaka og gera felags niðurstøðu við andstøðuumboð, tá talan er um eftirlitsvirksemi knýtt at løgtingsgranskoðarum (West 2018).

Løgtingsgrannskoðararnir eru fýra í tali og verða valdir sambært serligari løgtingslóg. Tað eru fýra teir størstu flokkarnar á tingi, ið velja løgtingsgrannskoðarar. Nevndin fyri løgtingsgrannskoðarar viðger mál av týdningi fyri landsroknskapin. Ein tílík nevnd verður í altjóða samanhangi nevnd ein Public Account Committee (PAC), og føroyska skipanin samsvarar sum heild væl við eyðkennir fyri tílíka eftirlitsskipan. Í føroysku skipanini er tað tó flokspolitiska umboðið hjá størsta flokkinum, ið er forfólk í nevndini, og tað kann vera eitt tingfólk frá samgonguni ella andstøðuni Hóast reglurnar ikki tryggja andstøðuni tann sessin, so er altíð í minsta lagi ein og ofta tveir av fýra løgtingsgrannskoðarum frá andstøðuflokkunum. Løgtingsgrannskoðarar hava eisini greiðar heimildir til sjálvir at taka mál upp og harvið seta mál á dagsskrá. Tað ger nevndin við at biðja Landsgrannskoðanina kanna mál (§14)[6], og tað er eitt styrkiseyðkenni fyri tílíka skipan. Landsgrannskoðarin virkar eisini sum umsiting hjá løgtingsgrannskoðarunum (Korff 2018; West 2018: 2.6.2, 4.4.2, 9.1). Landsstýrismálanevndin verður sett at hava eftirlit við, at virksemið hjá stjórnini verður útint á lógligan hátt (st.l.: § 39,1). Nevndin hevur 3 nevndarlimir, tvs. nevndin er minni í støðd. Vanliga hevur samgongan meirilutan í nevndini, tvs. 2 limir, og andstøðan hevur 1 lim. Nevndin tekur sjálv eftirlitsmál upp, men viðger eisini mál, ið onnur løgtingsfólk og uttanhýsis partar taka upp (viðmerkingar til st.l. § 39). Nevndin kannar mál og ger niðurstøðu av rættarligum reglu slag (viðmerkingar til st.l. § 39), men kann eisini taka avgerð um at seta uttanhýsis kanningarstjóra (st.l.: § 39,2).

Ein ábending um stovnsliga atferð í eftirlitsnevndunum er, um limirnir eru samdir í niðurstøðunum, tvs. tvørtur um samgongu og andstøðu. Ósemja í niðurstøðum kann hinvegin vera ein ábending um flokspolitiska atferð. Kanning av eftirlitsvirksemi hjá løgtingsgrannskoðarunum vísur, at nevndin brúkar møguleikan at taka mál upp, og at løgtingsgrannskoðarar í øllum málum gera

[6] Løgtingslóg um grannskoðan av landsroknskapinum no. 25 frá 1999.

viðmerkingar í felag, tvs. óansæð hvønn politiskan flokk tey umboða, og óansæð um flokkurin er í stjórn ella í andstøðu (West 2018). Nýggjari dømi um viðgerð av landsroknskapinum vísti somu mynd av samdum løgtingsgrannskoðarum (løgtingsmál 54/2023). Nevndin tykist sostatt fyri tað mesta at virka sum amboð hjá Løgtinginum at hava eftirlit við stjórnini, og løgtingsgrannskoðarar tykist ikki at taka atlit til flokspolitisk viðurskifti í hesum virkseminum. Løgtingsgrannskoðarar kunnu tó verða ósamdir í tilgongdini til arbeiðið, uttan at tað sæst í niðurstøðunum. Um tað verður lurtað eftir niðurstøðunum í fyrisitingini er tó meiri ógreitt (West 2018) og krevur nærri kanning.

Fyri landsstýrismálanevndina vísur kanning av eftirlitsmálum hjá nevndini ikki sama stig av stovnsligari atferð. Í talvu 2 eru eftirlitsmál fyri tíðarskeiðið 2004-2022. Í talvuni verður skilt millum, hvør hevur tikið stig til eftirlitsmálini, sum hava verið, tvs. um tað er nevndin sjálv, partar uttan fyri Løgtingið ella um tað eru onnur tingfólk. Um talan er um tingfólk, so verður munur gjørdur á um tingfólkið er partur av samgonguni ella andstøðuni. Talvan vísur eisini býtið millum semju og ósemju í niðurstøðunum í málum, sum nevndin hevur viðgjørt.

**Talva 2**

Eftirlitsmál hjá landsstýrismálanevndini, stigtakan og niðurstøður, tal og í %, tíðarskeiðið 2004-2022

| **Stigtakari til eftirlitsmál** | **Mál í alt** | **Nevndin samd** | **Nevndin ósamd** | **Óvist úrslit**[7] |
|---|---|---|---|---|
| Uttanhýsis partar | 22<br>100 % | 10<br>45 % | 3<br>14 % | 9<br>41 % |
| Tingfólk andstøða/samgonga | 34/2<br>100 % | 25<br>69 % | 9<br>25 % | 2<br>6 % |
| Nevndin sjálv | 8<br>100 % | 6<br>75 % | 1<br>12,5 % | 1<br>12,5 % |
| **Mál í alt** | **66**<br>**100 %** | **41**<br>**62 %** | **13**<br>**20 %** | **12**<br>**18 %** |

Talvan vísur, at landsstýrismálanevndin sjálv tekur stig til lutfalsliga fá mál, og at tað í staðin eru partar uttanfyri Løgtingið og onnur tingfólk, ið taka stig til flestu málini. Talvan vísur eisini, at tað serliga eru tingfólk frá andstøðuni, ið taka stig til eftirlitsmál, heili 34 av 36 málum komu frá tingfólki hjá andstøðuni. Tað eru sostatt greið flokspolitisk eyðkenni í stigtakanini til eftirlitsmálini hjá landsstýrismálanevndini.

[7] Tað fæst ikki innlit í skjølini í málinum, og tí er ikki møguligt at meta um semju ella ósemju í nevndini.

Men um hugt verður eftir niðurstøðunum hjá nevndini, so er mynstrið øðrvísi. Landsstýrismálanevndin hevur tilsamans verið samd í 41 av 66 málum, tvs. í 62 % av málunum. Í málum, ið nevndin sjálv hevur tikið stig til, hevur nevndin verið samd í 75 % av málunum, og í málum frá øðrum tingfólkum hevur nevndin verið samd í 69 % av málunum. Hóast greiða flokspolitiska atferð í stigtakan til eftirlitsmálini, so broytist tað í niðurstøðuni, har atferðin í størri mun er stovnslig. Um samanborið verður við líknandi kanning av eftirlitsnevndum í danska Folketinget, norska Stortinget og svenska Rigsdagen, so er semjustigið í niðurstøðunum fyri eftirlitsmál nakað lægri, men líknandi partapolitisk mynstur er í stigtakan til eftirlitsmál (West 2025).

## Tingnevndir og umsitingarlig orka

Ein fortreyt fyri, at Løgtingið sum heild kann virka sum ein sjálvstøðugur stovnur í politisku skipanini er umsitingarliga orkan. Umsitingarliga orkan hevur týdning fyri vavið og stigið av virksemi, bæði stovnsligt og flokspolitiskt. Men umsitingarliga orkan verður tó mett sum ein fortreyt fyri, at tingnevndir kunnu virka sambært stovnsliga endamálinum.

Ein uppgerð og nærri greining av umsitingarligu orkuni í Løgtinginum varð gjørd í 2018, og tað hava ikki verið munandi broytingar síðani. Sambært hesi uppgerð hevur Løgtingið áleið 10 fulltíðar starvsfólk, ið fáast við tingvirksemi. Tá mett verður um umsiting hjá tingum, so verður talið av starvsfólkum, ið fáast við tingvirksemi, umroknað til tal av starvsfólki fyri hvørt tingfólk, og úrslitið av tí fyri Løgtingið er áleið 0,3. Tílík tøl fyri Ísland og Danmark vóru í 2018 upplýst at vera ávikavist 1,7 og 2,2 (West, 2018: partur 4.3.5). Ein størri altjóða samanberandi meting ásetur, at markið fyri eitt lágt umsitingarligt støði hjá einum tingi er 1, tvs. 1 umsitingarfólk fyri hvørt tingfólk (Christiansen, Griglio, & Lupo 2023; Fasone 2023). Føroyska talið á 0,3 er sostatt langt undir hetta lágmarkið. Talið hevði framvegis verið lágt um starvsfólkini hjá politisku flokkunum á tingi vóru tald við. Tað vil við øðrum orðum siga, at føroysk tingfólk hava munandi minni umsitingarligan styrk samanborið við tingfólk aðrastaðni. Lága umsitingarliga orkan kann verða orsøk til ójavna stigið í virkseminum hjá tingnevndunum, og at landsstýrismálanevndin sjálv tekur stig til so fá eftirlitsmál.

## Býtispolitisk eyðkennir

Kanningin higartil hevur ávíst eitt bland av stovnsligum og flokspolitiskum fortreytum og virksemisábendingum. Men spurningurin er um grundarlag eisini er fyri niðurstøðu um politiska einstaklingaatferð í tingnevndunum, tvs. týdning av býtismyndlinum. Tað veldst í fyrsta umfari um stovnsligu møguleikarnar at tilluta býtisfyrimunir. Í flestu førum er ikki møguligt hjá tingnevndunum í Løgtinginum at áseta beinleiðis býtisfyrimunir sum part av eini tingnevndarviðgerð. Men fíggjarnevndin er eitt undantak í so máta, tí at nevndin

viðger beinleiðis býtispolitisk mál, og fíggjarlógin verður løgd fram sum eitt lógaruppskot, ið fíggjarnevndin formliga sæð kann orða uppskot til at broyta. Siðvenjan er tó, eins og aðrastaðni, at tað er stjórnin, ið leggur fíggjarpolitikkin til rættis. Kortini er tó vanligt, at fíggjarnevndin ger broytingar til fíggjarlógaruppskot, eftir at semja er gjørd millum samgonguflokkarnar um fíggjarpolitikkin, ið eisini er vorðið átalað av formanninum í Búskaparráðnum[8], og tað bendir á onnur atlit enn flokspolitisk. Dømir eru um, at tílíkar broytingar hava samband við landafrøðilig økir, ið við broyttum raðfestingum fáa tillutað býtispolitiskar fyrimunir í tílíkum broytingaruppskoti. Harumframt vísur kanning dømir um, at fíggjarnevndarlimir gera avtalu sínámillum um at hækka játtanir til felagsskapir. Eitt ávíst áhugafelag hevur í fleiri førum fingið hækkaða játtan við broytingaruppskoti hjá fíggjarnevndini, tvs. at broytingin ikki kom frá stjórnini (West 2024d). Harvið eru dømir um býtispolitiska tingnevndaratferð, ið er stýrt av sambandi millum fíggjarnevndarlimir og ávísar áhugapartar.

Umframt fíggjarnevndina so kann uttanlandsnevndin eisini verða viðkomandi í hesum sambandi. Áður nevnda talva fyri tingnevndar-fyrispurningar vísti, at uttanlandsnevndin í nógv størri mun enn hinar tingnevndirnar brúkar møguleikan fyri sjálv at seta mál á dagsskrá, tvs. at stjórnin ikki hevur eins stórt ræði á uttanlandsnevndini sum á hinum tingnevndunum. Tað nýtist tó ikki at vera politisk einstaklingaatferð, men heldur stovnsligt atferðartekin. Uttanlandsnevndin hevur nevniliga umframt nevndarfyrispurningar eisini sonevndar ráðførslur til viðgerðar, ið er málsslag sum bert uttanlandsnevndin hevur. Sambært stýrisskipanarlógini (nr. 103 frá 1994: § 54) skal Landsstýrið ráðføra seg við uttanlandsnevndina í málum av størri týdningi. Tað styrkir støðuna hjá Løgtinginum mótvegis Landsstýrinum og stuðlar stovnsmyndlinum, men tað er framvegis ikki greitt, júst nær skipanin skal brúkast, og ósemjur koma meiri enn so fyri. Ávís siðvenja er tó ment og ráðførslur eru í málum um handilsavtalur, fiskivinnusamráðingar og spurningar um limaskap í altjóða felagsskapum[9]. Tað hevur sjálvsagt eisini týdning, at heimildarlógin avmarkar føroyska uttanríkispolitiska leiklutin og er tískil eisini ein skipanarlig fortreyt fyri virkseminum hjá uttanlandsnevndini.

Men um hugt verður nærri at, hvat nevndarfyrispurningarnir og ráðførslurnar hjá uttanlandsnevndini snúgva seg um, so sæst, at tað serliga eru fiskivinnusamráðingar, ið fylla. Fiskivinnusamráðingar og handilsviðurskifti eru evni fyri 41 (28+13) av 62 ráðførslum (66 %), meðan heili 9 av 14 samráðum eru um fiskivinnusamráðingar (64 %). Hesi úrslit síggjast í talvu 3.

---

[8] Kringvarp Føroya 17.12.2024, Keðiligur óvani hjá fíggjarnevndini | Kringvarp Føroya, tikið niður 13.04.2025.

[9] Kelda: Skrivari í uttanlandsnevndini í Løgtinginum, Rannvá Sólheim, 5. novembur 2020, og deildarstjóri fyri uttanríkisviðurskifti í miðfyrisitingini, Gunnar Holm-Jacobsen, 1. desembur 2020.

**Talva 3**
Tal av ráðførslum og nevndarfyrispurningum í uttanlandsnevndini, býtt á evnir, 2011-2020[10]

| | Ráðførslur | Fyrispurningar |
|---|---|---|
| Fiskivinnusamráðingar | 28 | 9 |
| Handilsviðurskifti | 13 | 0 |
| Politikk samstarv | 5 | 0 |
| Undirgrund | 5 | 0 |
| Altjóða samstarv annars | 11 | 5 |
| **Í alt** | **62** | **14** |

Málini í uttanlandsnevndini, sum nevndin hevur ávirkan á, snúgva seg sostatt fyri tað mesta um býtispolitikk, og tað at amboðið við samráðum, ið krevur ein stóran meiriluta av nevndini, fyri tað mesta snýr seg um fiskivinnusamráðingar kann benda á, at tað ikki bert eru flokspolitisk atlit aftanfyri. Føroyar hava eisini aðrar heimildir á uttanríkispolitiska økinum og hava tikið undir við eini røð av ymiskum altjóða sáttmálum av virðispolitiskum slag, ið átti at sæst betur aftur, um talan var um stovnsliga atferð í virkseminum hjá uttanlandsnevndini.

## Niðurstøða

Greinin hevur sett sjóneykuna á tingnevndarskipanina í Løgtinginum. Vanliga verður mett, at um eitt ting skal hava sjálvstøðugan týdning í eini politiskari skipan, so er týdningarmikið við vælskipaðum tingnevndum, ið eru grundarlag fyri sonevndum "arbeiðandi tingum".

Greinin hevur staðfest, at hóast Løgtingið er eitt sera lítið ting, so eru tingnevndirnar skipaðar eftir meginreglu um sergreining, og tingnevndirnar hava munagóð amboð til at viðgera mál og gera broytingar í málum, sum verða víst til nevndina at viðgera, og fleiri minnilutaatlit eru galdandi. Tingnevndirnar hava harumframt eisini amboð til sjálvar at seta mál á dagsskrá. Onnur vanlig amboð, vanlig kunningarrættindi og hoyringar, eru tó ikki galdandi fyri tingnevndir í Løgtinginum. Greinin ávísur eisini, at ein lutfalsliga stórur partur av tingfundarvirksemi fer fram í tingnevndunum. Løgtingið hevur sostatt fleiri eyðkennir fyri sonevnd "arbeiðandi" ting. Tað vil tó ikki siga, at tað ikki verður

[10] Kelda til ráðførslur: Gerðabók, uttanlandsnevndin, tingár 2011-2018. Fyri tingár 2019-2020 er yvirlit yvir mál brúkt. Kelda til fyrispurningar: Málsyvirlit, savnað saman 09.09.2021. Hesar dátur eru eisini grundarlag undir talvu í aðrari útgávu.

kjakast í tingsalinum eisini. Tað mugu aðrar kanningar avgera. Tingnevndirnar eru tó ikki javnt virknar og rættiliga stór spjaðing er millum tingnevndirnar.

Greinin hevur eisini kannað, í hvørjum føri tingnevndir virka sum amboð hjá tinginum at styrkja støðuna mótvegis stjórn og fyrisiting, sum pallar fyri flokspolitiska kapping, og um grundarlag er fyri, at tingnevndir eisini virka sum amboð hjá einstøkum tingfólkum at gera avtalur um býtisfyrimunir. Greinin vísur á, at eyðkennir og virksemi tala fyri einum blandi av stovnsligari og flokspolitiskari atferð, eins og væntað varð. Politisku flokkarnir, tvs. serliga samgongumeirilutin, tykist sum heild at hava tamarhald á virkseminum í vanligu politikknevndunum. Eftirlitsnevndirnar, tvs. nevndin fyri løgtingsgrannskoðarar og landsstýrismálanevndin, hava tó fleiri stovnslig eyðkennir. Serliga løgtingsgrannskoðarar eru samdir í niðurstøðum í eftirlitsmálum. Greinin vísur harumframt á, at tað er grundarlag fyri niðurstøðu um, at tingfólk í ein ávísan mun, í fíggjarnevndini og uttanlandsnevndini, brúka tingnevndarvirksemi til at gera sínámillum býtisavtalur, sum ikki er úrslit av politiskum flokssemjum.

Harumframt hevur greinin tikið sera avmarkaðu umsitingarligu orkuna hjá Løgtinginum fram, og víst á, at tað serliga er ein avbjóðing fyri sjálvstøðugt stovnsligt virksemi í tingnevndunum, men helst eisini hjá Løgtinginum sum heild. Altjóða gransking hevur áður ávíst samband millum hækkan av umsitingarligum stuðli og stigið av virksemi hjá tingum (Green-Pedersen 2010), men eisini, at vantandi umsitingarlig orka ger tað trupult at tryggja tingfólkum óhefta kunning, tvs. at ting í tílíkum føri í ov stóran mun verða bundin av kunning frá stjórnini (Otjes 2023). Tað vil tó altíð vera ein politiskur spurningur at avgera fortreytirnar hjá tingnevndunum at virka og hjá Løgtinginum sum heild.

## Yvirlit yvir talvur og myndir

*Mynd 1.* Tal av árligum tingfundum, tingnevndarfundum og tingmálum, tingárini 1997-2018

*Mynd 2.* Tal av árligum tingnevndarfundum, býtt á tingnevndir, tingárini 1997-2018

*Talva 1.* Tal av nevndarfyrispurningum/samráðum, býtt á tingnevndir, tingárini 2008-2021,

*Talva 2.* Eftirlitsmál hjá landsstýrismálanevndini, stigtakan og niðurstøður, tal og í %, 2004-2022

*Talva 3.* Tal av ráðførslum og nevndarfyrispurningum í uttanlandsnevndini, býtt á evnir, 2011-2020

## Stuðul

Greinin er lutvíst fíggjað av Carlsbergfondet (CF19-0618).

## Tilvísingar

Andeweg, R, & L Nijzink. 1995. "Beyond the Two-Body Image: Relations Between Ministers and MPs." Í *Parliaments and Majority Rule in Western Europe*, ritst. H. Döring. Frankfurt: Campus Verlag.

Arter, D. 2016. *Scandinavian Politics Today*. Manchester: Manchester University Press.

Christiansen, T., E. Griglio & N. Lupo. 2023. "INTRODUCTION A Global Perspective on the Role of Parliamentary Administrations." Í *The Routledge Handbook of Parliamentary Administrations*, ritst. T. Christiansen et. al. London: Routledge, 1–16.

Cox, G. W. & M. D. McCubbins. 1993. *Legislative Leviathan*. Berkeley: University of California Press.

Esaiasson, P. & K. Heidar. 2000. *Beyond Westminister and Congress: The Nordic Experience*. Ohio: The Ohio State University.

Fasone, C. 2023. "A Distinct Role for Parliamentary Administrations in Presidential and Parliamentary Systems?" In *The Routledge Handbook of Parliamentary Administrations*, ed. Thomas et al. Christiansen. London: Routledge, 19–37.

Garritzmann, J. L. 2017. "How Much Power Do Oppositions Have? Comparing the Opportunity Structures of Parliamentary Oppositions in 21 Democracies." *Journal of Legislative Studies* 23(1): 1–30. doi:10.1080/13572334.2017.1283913.

Green-Pedersen, C. 2010. "Bringing Parties into Parliament: The Development of Parliamentary Activities in Western Europe." *Party Politics* 16(3): 347–69. doi:10.1177/1354068809341057.

Hall, P. A. & R. C. R. Taylor. 1996. "Political Science and the Three New Institutionalisms." *Political Studies* 44(5): 936–57. doi:10.1111/j.1467-9248.1996.tb00343.x.

Hansen, M. E. 2019. "Distributing Chairs and Seats in Committees: A Parliamentary Perspective." *Parliamentary Affairs* 72(1): 202–22. doi:10.1093/pa/gsy008.

Heidar, K. 2000. "Parliamentary Party Groups." In *Beyond Westminister and Congress: The Nordic Experience*, ritst. P. Esaiasson & K. Heidar. Ohio: The Ohio State University, 183–209.

Heidar, K. & R. Karlsen. 2018. "All about the Party? Constituency Representation—and Service—in Norway." *Representation* 54(1): 69–85. doi:10.1080/00344893.2018.1489890.

Jensen, H. 1995. *Arenaer Eller Aktører? En Analyse Af Folketingets Stående Udvalg*. Frederiksberg: Samfundslitteratur.

Jensen, T. K. 2000. “Party Cohesion.” Í *Beyond Westminister and Congress: The Nordic Experience*, ritst. Peter Esaiasson and Knud Heidar. Ohio: The Ohio State University, 210–37.

Korff, G. 2018. “The Parliamentary Public Accounts Committees in the Nordic Countries and Regions - Denmark, Faroe Islands, Finland, Greenland, Iceland, Norway, Sweden, and Aaland Islands.” Í *Beyond Westminister: A Global Perspective on Public Governance and Accounts*, ritst. Rick Stapenhurst and Brooke Larson. Washington, DC: The World Bank, 40–58.

Krehbiel, K. 1991. *Information and Legislative Organization*. Ann Arbor: The University of Michigan Press.

Kreppel, A. 2017. “Legislatures.” In *Comparative Politics*, ritst. Daniele Caramani. Oxford: Oxford University Press, 117–35.

Martin, L. & G. Vanberg. 2014. “Legislative Institutions and Coalition Government.” In *The Oxford Handbook of Legislative Studies*, ritst. S. Martin, T. Saalfeld & K. Strøm, Oxford University Press, 436–55.

Martin, S. 2011. “Electoral Institutions, the Personal Vote, and Legislative Organization.” *Legislative Studies Quarterly* 36(3): 339–61. doi:10.1111/j.1939-9162.2011.00018.x.

Martin, S. 2014. “Committees.” Í *The Oxford Handbook of Legislative Studies*, ritst. S. Martin, T. Saalfeld & K. Strøm. Oxford University Press.

Matthews, D. 1960. *U.S. Senators and Their World*. Chapel Hill, NC: University of North Carolina Press.

Mattson, I, and K Strøm. 1995. “Parliamentary Committees.” Í *Parliaments and Majority Rule in Western Europe*, ritst. H. Döring. Frankfurt: Campus Verlag, 249–307.

Müller, W. C. 2000. “Political Parties in Parliamentary Democracies: Making Delegation and Accountability Work.” *European Journal of Political Research* 37(3): 309–33. doi:10.1111/1475-6765.00515.

Müller, W. C. & U. Sieberer. 2014. “Procedure and Rules in Legislatures.” Í *The Oxford Handbook of Legislative Studies*, ritst. S. Martin, T. Saalfeld & K. Strøm. Oxford: Oxford University Press, 311–32.

Norton, P. 2019. “Post-Legislative Scrutiny in the UK Parliament: Adding Value”, *The Journal of Legislative Studies,* 25(3): 340–57. doi:10.1080/13572334.2019.1633778.

Otjes, S. 2023. “What Explains the Size of Parliamentary Staff ?”, *West European Politics,* 46(2): 374–400. doi:10.1080/01402382.2022.2049068.

Saalfeld, T. 2000. “Members of Parliament and Governments in Western Europe: Agency Relations and Problems of Oversight”, *European Journal of Political Research* 37(3): 353–76. doi:10.1111/1475-6765.00517.

Scharpf, F. W. 1997. *Games Real Actors Play - Actor-Centered Institutionalism in Policy Research*. Boulder: Westview Press.

Shepsle, K. A. & B. R. Weingast. 1994. "Positive Theories of Congressional Institutions", *Legislative Studies Quarterly,* 29(2): 149–79.

Sieberer, U. 2011. "The Institutional Power of Western European Parliaments: A Multidimensional Analysis", *West European Politics* 34(4): 731–54. doi:10.1080/01402382.2011.572389.

Siefken, S. & H. Rommetvedt. 2021. *Parliamentary Committees in the Policy Process*. London: Routledge.

Strøm, K. 1990. "A Behavioral Theory of Competitive Political Parties." *American Journal of Political Science* 34(2): 565–98.

Strøm, K. 2003. "Parliamentary Democracy and Delegation." Í *Delegation and Accountability in Parliamentary Democracies*, ritst. K. Strøm, Müller, W. & T. Bergman. Oxford: Oxford University Press, 55–109.

Strøm, Kaare. 2012. "Roles as Strategies - Towards a Logic of Legislative Behavior.'" Í *Parliamentary Roles in Moderns Legislatures*, ritst. M. Blomgren & O. Rozenberg. New York: Routledge, 85–99.

West, H. 2018. "MP Firefighting: When Do MPs Hold Government Accountable?", Aarhus University, Politicas ph.d. serie.

West, H. 2022. "Skipanarligar fortreytir og føroysk stjórnarviðurskifti." *Fróðskaparrit* 68: 87–110.

West, H. 2024a. "Parliamentary Committees and Ex-Post Oversight: Institutional Options and Design." *Parliamentary Affairs* 77(3): 601–22. doi:10.1093/pa/gsad015.

West, H. 2024b. "Political Parties and Parliamentary Oversight Committee Seats: Sharing and Trading the Costs." *Journal of Legislative Studies*. doi:10.1080/13572334.2024.2335716.

West, H. 2024d. "Politiska dagsskráin og abort sum eitt ikki-mál /The Political Agenda and Abortion as a Non-Issue)." Í *Abort – Grundgevingar fyri rættinum at velja sjálv*, ritst. T. Hermannsdóttir & T. Nolsøe. Vestmanna: Sprotin, 93–117.

West, H. 2025. "Oversight Case Outcomes and Effects of Controlled Institutional Settings", er til metingar.